## Krevja ókeypis hítir

Tað gongst illa at fáa tey ungu í Danmark at brúka hít undir samlegu, men nú vísir ein spurnarkanning hjá Sex & Samfund, at høvdu tey ungu fingið hítirnar ókeypis, høvdu tey brúkt tær nógv meiri enn nú. Av teimum 600 spurdu svaraðu 53 prosent, at tey høvdu brúkt hít oftari, um tey fingu tær fyri einki. Marianne Lomholdt hjá Sex & Samfund sigur við DR, at kanningarúrslitið kom ikki óvart á seg, og at tað er ein staðfesting av, at tað er ikki nóg mikið við upplýsing um, hvussu umráðandi tað er at brúka hít. Ókeypis hítir er heldur ikki nóg mikið, tí upplýsing er er eisini neyðug, sigur hon.



# ast



*Rósa Samuelsen, landsstýrisfólk við almannamálum, heldur ikki, at vælferðarføroyar eru í fillum. Tí støðið hjá brúkarum í Føroyum er á umleið sama støði, sum í grannalondunum*

fingið stuðul við sær. Tó kann mann siga, at tað altíð verður ein meting hjá Nærverkinum, at avgera, hvør tørvurin er, sigur Rósa Samuelsen.

Spurd um tað ikki er lætt hjá einum landsstýrisfólki at flyta ábyrgdina til ein serstakan stovn, sigur Rósa Samuelsen, at tað ikki er uppgávan hjá almannamálaráðnum at taka sær av serstøkum málum, uttan so at trupulleikar stinga seg upp.

Víðari greiðir hon frá, at ein kanning í løtuni verður gjørd á økinum, sum kann vísa, hvørjar rationaliseringar kunnu gerast, samstundis sum hon kann vísa, hvør tørvur er.

Tó kennir landsstýriskvinnan til, at onkrir trupulleikar hava verið við at skaffa stuðlar í vár, men so vítt hon kann siga, vóru hesir loystir. Somuleiðis sigur hon, at tænastan altíð verður í mun til játtanina, og at skerjingarnar hjá fíggjarnevndini á økinum helst hava gjørt sína ávirkan.

Viðvíkjandi spurninginum, um at fólk verða tikin heim til Føroyar frá tilboðum, tey hava verið glað fyri uttanlands, greiðir Rósa Samuelsen frá, at tað er trupult at fara inn í serstøk mál, men at hesin spurningurin verður viðgjørdur bæði í ráðnum og á Løgtingi.

Um supervisión og umlætting, sigur Rósa Samuelsen ikki kenna til, at nakrar broytingar skulu hava verið gjørdar har, og at hetta eisini er ein spurningur til Nærverkið.

### Børn og ung

Nógv rumbul hevur verið kring økið børn og ung seinasta árið, og hetta rumbul steðgar helst ikki enn, men Rósa Samuelsen greiðir frá, at tey arbeiða við málinum.

- Sum er, er tað bara familjudeildin, sum ikki fungerar og har arbeiða vit við eini loysn. Men sum eg skilji er heldur ongin, sum hevur tørv á tí tilboðnum beint nú, sigur Rósa Samuelsen.

Hon greiðir víðari frá, at stovnarnir Rókin og Slóðin ikki enn eru farnir í sama bygning, tí í løtuni verður leitað eftir einum hóskandi bygningi.

Róð hevur verið framundir, at tað ikki ber til at koyra hesar ymisku brúkararnar á sama stovn. Hesum vísir Rósa Samuelsen aftur.

- Fyri tað um fólk eru í sama bygningi, so merkir tað ikki, at tey skulu vera saman. Tað ber til at hava ymiskar deildir, og tað er eisini ætlanin, sigur landsstýriskvinnan.

Hon greiðir víðari frá, at tað kann geva stórar fyrimunir at hava ein størri stovn, tí so eru fleiri fólk til arbeiðis og nógvar rationaliseringar gerast.

### Verja tey veikastu

23. desembur í fjør greiddi Rósa Samuelsen frá, at hon vildi syrgja fyri, at tey veikastu í samfelagnum ikki skuldu koma í rasshaft av broytingum, ið blivu neyðugar eftir at tað gjørdist greitt, at hon ikki hevði so nógvan pening. Hetta heldur hon er eydnast.

- Tað kann vera, at summi gjalda meira í dag, men tey allar veikastu kunnu fáa hjálp, og tað vil altíð vera meiningin hjá okkum, at veikastu herðarnar skulu bera minst, sigur Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna við almannamálum.

---

Vælferðarføroyar í fillum:

# Senda heldur fólk av landinum

**Jancy Klein, leiðari fyri barnaverndartænastuna í Norðoyggjum, er bangin fyri gongdini á økinum »børn og ung«. – Sum støðan er nú, so vita vit ikki, hvør skal taka sær av okkara brúkarum. Tí hugsa vit ofta um at senda brúkarar av landinum, sigur hon**



*Jancy Klein, leiðari fyri barnaverndartænastuna í Norðoyggjum, heldur øgiliga lítið um støðuna á økinum børn og ung í løtuni*

BØRN OG UNG
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Barnaverndartænasturnar kring landið kenna seg ótryggar. Fyri kortum var alt økið flutt frá Almannastovuni til Nærverkið, hóast ein arbeiðsbólkur situr og arbeiðir við eini varandi loysn.

Jancy Klein, leiðari fyri barnaverndartænastuna í Norðoyggjum, er sera bangin fyri gongdini, og staðfestir, at allar hesar hendingar hava havt øgiliga keðiligar avleiðingar fyri trivnaðin á økinum og at serkunnleikin, sum hevur verið, er burtur.

- Sum støðan er nú, hugsa vit ofta um at senda brúkararnar av landinum, har vit fáa betri tilboð fyri somu pengar, enn vit gera í Føroyum, sigur Jancy Klein.

Hon leggur afturat, at hon ikki ivast í, at støðan er eins aðrastaðni í landinum, tí barnaverndirnar kring landið og heldur ikki fakfólkini á ymisku stovnunum eru spurd um nakað í allari tilgongdini, og tað hevur við sær, at fakfólkini eru burtur og barnaverndirnar hava mist álitið á skipanunum í Føroyum.

### Arbeiðsbólkur í gongd

Tá ætlanirnar við at umskipa økið børn og ung komu fram á fyrsta sinni, greiddu barnaverndirnar kring landið frá, at tær ikki hildu bestu loysnina vera at umskipa økið, uttan at spyrja tey, sum arbeiða við økinum.

- Tað hevði við sær, at ein arbeiðsbólkur var settur, har viðkomandi partarnir vóru umboðaðir. Hesin bólkur skuldi so koma við eini loysn, men hon er ikki komin enn. So fáa vit brádliga gjøgnum fjølmiðlarnar at vita, at alt økið er flutt undir Nærverkið, sigur Jancy Klein.

Hon undrast, at hetta skal henda, samstundis sum ein arbeiðsbólkur arbeiðir við eini varandi loysn.

### Fígging fæst

Leiðarin fyri barnaverndartænastuna í Norðoyggjum, slær somuleiðis fast, at veruligi trupulleikin ikki hevur við fígging at gera.

- Vit fáa altíð vælvild frá kommununi til at loysa hesar trupulleikarnar. Veruligi trupulleikin er hinvegin, at øll menningin, sum fór fram, áðrenn byrjað var at umskipa, er steðgað, samstundis sum tænastan í ávísum førum er vorðin verri, og tí hugsa vit um at senda fólkini av landinum á stovn, sigur Jancy Klein.

Hon heldur sjálv loysnina vera at leggja alt økið við børnum og ungum til kommunurnar at umsita.